




Puntur nr. 6







# Oslo er eitt frálíkt ferðamál

**Tað er torført at venja fólk, at ferðast í øðrum norðurlondum enn Danmark, sigur Maria á Lofti av marknaðardeildini hjá Atlantic Airways, ið heldur Oslo verða eitt sera spennandi ferðamál, ið munandi fleiri føroyingar áttu at roynt**

FERÐING

Atlantic Airways fer 27. juni undir at flúgva úr Vágum til norska høvuðsstaðin Oslo. Flogið verður tvær ferðir um vikuna týsdag og fríggjadag. Flúgvingin er einans talan fram til 15. august, ella við øðrum orðum um sjálvt høvuðs summar tíðarskeiðið.

Atlantic Airways hevur flogið hesa rutu mitt um summarið nú í fleiri ár, við rættiliga góðum úrslitum. Maria á Lofti av marknaðardeildini greiðir frá, at tey upprunaliga fóru undir hesa flúgving, tí mett var, at tað var óheppið, at flúgvingin bert var til Vestlandi í Noregi. Frammanundan flugu tey til Stavanger, hetta var fyrst og fremst oljuflúgving, og henda ruta er enn til. Men við at flúgva til Oslo, var møguleiki fyri at fáa størri ferðaløg við ferðafólki til Føroyar. Tað er munandi léttari hjá flestu norðmonnum at koma til Oslo enn til Stavanger, og so er norski høvuðsstaðurin eisini eitt meira spennandi ferðamál hjá føroyskum ferðafólki, ið Atlantic Airways fegin vildi bjóða sínum viðskiftafólki.

Maria greiðir frá, at flúgvingin hevur gingið væl hesi árini. Saman við Green Gate bjóðar Atlantic Airways pakkaferðir úr Noregi, og hesar eru vælumtóktar. Tí tað er serliga fólk úr Noregi, ið brúka hesa rutu. Hóast bæði Atlantic Airways og ferðavinnuskrivstovurnar bjóða pakkaferðir til Oslo fyri føroyingar, er hetta ikki so nógv brúkt.

Hóast Oslo er ein sera spennandi býur, ið hevur nógv at bjóða ferðafólki, so tykjast føroyingar meira áhugaðir í at vitja Danmark, ella fara longur út í heim, heldur enn at ferðast í øðrum norðurlondum. Hetta er spell heldur Maria, ið vísir á, at Oslo við sínum nógvu áhugaverdu parkum, síni savnsoyggj og nógvu spennandi støðum og matstovum er eitt sera áhugavert ferðamál.

Tíðarskeiðið, ið Atlantic Airways flýgur til Oslo er einans góðan hálvan annan mánað um árið, hetta er sjálvandi eisini dekan ov stutt til at venja føroyingar við Oslo sum veruligt ferðamál.

Tað er heldur eingin loyna, at nógvir føroyingar velja heldur at fara sjóvegis til Noregs, soleiðis at tey fáa bilin við og kunnu koyra runt í Noregi.




